# Taff er púra paff

**- Eg var púra tikin á bóli, tá eg fyrstu ferð hoyrdi tykkara tónleikarar og sangarar spæla saman við mær á Gøtusandi. Tað undrar meg, at tit kunnu hava eitt so ríkt tónleikalív her úti í Atlantshavinum, sigur heimskendi sangarin, Russ Taff. Í hesum døgum tekur hann upp sína 14. solofløgu í Kris-Stuff Studio í Hoyvík, saman við Jákupi Zachariasen**



TÓNLEIKUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Føroyar/Nashville:** Arbeiðið við fløguni byrjaði um vikuskiftið.

Teir hava longu tikið okkurt upp, men hesar komandi mánaðirnar verður tað stóra takið: Tónleikur skal spælast inn. Sangurin skal takast upp og alt skal síðani miksast á eitt masterband.

Hetta verður eftir ætlan liðugt í summar, og seinni í heyst kemur henda føroysk-amerikanska fløgan út. Tað serstaka við henni er, at Jákup Zachariasen og hansara fólk standa 100 prosent fyri øllum: Frá hugskotinum til eitt lag og til tað umsíðir verður útgivið á fløgu í heyst.

Russ Taff er kendur í gospel-umhvørvinum kring allan heimin, og hevur verið við í einum ótali av innspælingum í sínum 56 ára langa lívi. Nú verður fløgan "Made in Faroe Island".

Hvørjar vónir hevur so Russ Taff sjálvur til hesa komandi útgávuna? Svarið kemur beinanvegin:

- Fyri meg, er tónleikurin ein tann mest máttmikli faktorurin í heiminum í dag. Ein av pávunum í Rom segði einaferð, at hann hevði heldur viljað býtt túsundtals messur um fyri ein góðan sang. Fólk minnst nevniliga sangir.

- Tá so henda fløgan er liðug vóni eg, at onkur fer at kenna seg nærri knýttan at konu ella unnustu síni. At onkur verður nærri knýttur at børnum sínum. At onkur hoyrir eitt lag og fer at virðismeta eitt sólarris hægri. Og sjálvandi eisini, at onkur má kenna seg nærri knýttan at Gudi enn áður. Tí tónleikur vísir altíð vegin uppeftir, tá hann kemur úr røttum staði.

- Eg ynski, at tá fólk hava lurtað eftir fløguni, at tey tá kunnu siga, at hon nam við meg, - ja, at henda fløgan fekk meg at taka eina avgerð og at handla, sigur Russ Taff.

*Her hjá tykkum upplivi eg ein slíkan reinleika fyri at umskapa og fáa tónleikin til tað, sum hann veruliga er ætlaður til: At fáa teg at flenna, at gráta og eisini at føla nakað*

## Tónleikari í heimsflokki

Tað var í roynd og veru á G!-festivalinum í 2004 at eitt tónlistarligt vinarlag birtist millum tann heimskenda Russ Taff úr Nashville, og tann meiri og meiri kenda tónleikasnillingin, Jákup Zachariassen úr Havn.

Hetta var fyrstu ferð, at Russ Taff yvirhøvur var í Føroyum. Hann kom einsamallur, men Jákup fekk sum uppgávu at seta saman ein tónleikabólk og kór at framføra saman við honum.

Tað var longu her á Gøtusandi, at Russ byrjaði at undra seg yvir føroyingar: At ein her hevði givið so nógvar fløgur út, og at ein her átti so frægar tónleikarar og sangarar, sum teir ið Jákup fekk savnað saman – og fekk at spæla saman við sær á so høgum støði.

- Eg visti ikki nógv um Føroyar áðrenn hetta. Men eg varð púra tikin á bóli, tá eg hoyrdi tónleikarar og sangarar tykkara. Og á konsertini upplivdi eg eisini, hvussu gott úrslit spurdist burturúr.

- Satt at siga, gjørdist eg eisini púrasta paff, tá eg fann út av, at tit her eiga ein so fantastiskan mann á steel-guitaranum sum Jákup. Hann er ein tann besti av sínum slagi, skal eg heilsa og siga. Hansara "passión" fyri tónleiki sært tú fáastaðni kring heimin, slær Russ Taff fast.

Í heimbýi hansara, Nashville finst ein hópur av slíkum spælarum, men fyri Russ var eingin ivi um, at hann her sat saman við einum spælara í heimsflokki, og sum haraftrat brendi fyri sakini tá – og framvegis ger tað!

## Tað besta av tí besta

Russ hevur verið í Føroyum tríggjar ferðir áður, og nú hann er komin á fjórða sinni, er hann av sonnum vorðin greiður yvir, hvussu stóran týdning og ávirkan ið tann føroyski tónleikurin hevur havt og framvegis hevur á hann.

*Hetta minnir ikki sørt um ta fyrstu gleðina og ta fyrstu tíðina, tá eg var tónleikari: Gleðin um at skriva tónleik. Gleðin um at framføra tónleik, og gleðin um at kunna gleða onnur við mínum tónleiki.*

Eftir enn eina vitjan her í summar, har hann og Jákup tosaðu nógv saman, varð avgerðin tikin: Russ bar eitt hugskot fram føroyska vinmann sín, og tað var ikki meiri enn hálvtalað orð, so skuldi hetta setast í verk. Her vóru bæði fólk og umstøður til at skriva tekstir, løg og til framleiðslu av eini nýggjari fløgu á føroyskari jørð.

- Tá eg so sá hetta studio'ið hjá Kristoffuri, so bleiv eg enn einaferð ovfarin av útgerðini og